# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | Skrivið her |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**trygdarskeið fyri manning á skipum**

Við heimild í § 4, § 6, stk. 1, nr. 1-4 og stk. 2, § 8, stk. 4 og § 11 í løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. verður ásett:

*Øki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um trygdarskeið fyri manning á skipi sambært §§ 16 og 17 í kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum.

*Krøv til trygdarskeiðið*

**§ 2.** Trygdarskeiðið til manning við skipi skal lúka krøvini í altjóða sáttmálanum um útbúgving, um sjóvinnu og um vaktarhald fyri manning á skipi í STCW-F sáttmálanum, regla III/I, Training and Certification of Fishing Vessel Personel. Partar av skeiðnum eru eisini í samsvari við STCW A-VI/1.1, 1.3 og 1.4.

*Mál fyri skeiðið*

**§ 3.** Trygdarskeiðið skal menna næmingin við denti á vitan um trygd.

**§ 4.** Førleikamálini fevna um ta vitan, tey evni og teir førleikar, sum næmingurin skal røkka á trygdarskeiðnum fyri manning á skipum.

*Stk. 2.* Vitanarførleikarnir sbrt. stk. 1. geva næminginum:

1) kunnleika til ta bjargingarútgerð, sum er umborð á einum skipi,
2) kunnleika til vanlukkur á sjónum og bjarging á sjónum,
3) grundleggjandi vitan um eld og eldsløkking,
4) kunnleika til arbeiðstrygd umborð á einum skipi,
5) grundleggjandi vitan um fyrstuhjálp.

*Stk. 3.* Evnisførleikarnir sbrt. stk. 1 fevna um:

1) nýtslu av bjargingarútgerð, sum er kravd umborð,
2) luttaka í sambandi við eftirlit og røkt av persónligari bjargingarútgerð og
3) luttaka í eldsløkking við ymiskum sløkkievnum.

*Stk. 4.* Umframt teir førleikar, ið nevndir eru í stk. 2 og 3, nemur næmingurin sær førleikar at:

1) luttaka í trygdararbeiði umborð á einum skipi,
2) veita fyrstuhjálp í sambandi við vanlukkur og sjúku, sum brádliga kemur fyri og
3) vera tilvitaður um ein ábyrgdarfullan atburð við handfaring av eldfimum evnum og tilfari, og er vitandi um týdningin av tilbúning um fyribyrging av eldi umborð.

*Skipan av skeiðinum*

**§ 5.** Trygdarskeiðið verður skipað á tann hátt, at samsvar er millum ástøðiliga partin og starvsvenjingina.
*Stk. 2.* Skiftandi undirvísingarhættir skulu stuðla undir menningina av sjálvbjargni og samstarvsevnum.
*Stk. 3.* Skúlin skal skipa skeiðið á tann hátt, at tað lýkur krøvini í stk. 1 og 2 og innihaldinum í skjali 1.
*Stk. 4.* Skúlin hevur ábyrgdina av, at skeiðið verður framt sambært hesi kunngerð.

*Longd á skeiðinum*

**§ 6.** Longdin á trygdarskeiðinum verður ásett í mun til útbúgvingarkrøvini í § 2 og málið fyri skeiðið í § 3 og § 4, stk. 2-4.

*Upptøka*

**§ 7.** Upptøka til trygdarskeiðið fyri manning á skipum er treytað av, at umsøkjarin:
1) hevur galdandi heilsuprógv fyri sjófólk og
2) er fyltur 16 ár.
*Stk. 2.* Skúlin hevur ábyrgdina av upptøku á trygdarskeiðnum og at tryggja, at umsøkjarar lúka upptøkukrøvini sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Fyri næmingar í fólkaskúlanum undir 16 ár, kann frávik gerast frá stk. 1, nr. 1, tó skulu hesir hava eina heilsuváttan.
*Stk. 4.* Fyri næmingar í fólkaskúlanum, kann frávik gerast frá stk. 1, nr. 2

*Prógv*

**§ 8.** Kravið til fullført skeið er full luttøka í undirvísingini ella góðkenning frá skeiðsveitara við støði í eini eftirmeting.
*Stk. 2.* Skúlin skrivar út skeiðsprógv, tá ið næmingurin hevur fullført skeiðið.

*Undirvísingarførleiki*

**§ 9.** Lærari, sum skal undirvísa í trygdarskeiði fyri manning á skipum, skal í minsta lagi hava útbúgving sum skipsførari við í minsta lagi tvey ára royndum sum einastýrimaður, yvirstýrimaður ella skipari við handilsskipi ella skipi.
*Stk. 2.* Fyri at verða settur í fast starv, skal lærari hava lokið viðkomandi námsfrøðiliga støðisútbúgving ella skeið.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn frá skúlanum góðkenna skeiðslærara, sum hevur aðra útbúgving, skeið og/ella viðkomandi starvsroyndir enn tær í stk. 1 og 2 nevndu.

*Kærur*

**§ 10.** Avgerðir, sum skúlin tekur sambært hesi kunngerð, kunnu kærast til landsstýrismannin.
*Stk. 2.* Kærur um avgerðir sambært stk. 1. skulu latast leiðara skúlans til hoyringar. Kærarin skal hava høvi at gera viðmerkingar til hoyringarsvarið frá leiðara skúlans í seinasta lagi 7 dagar frá tí degi, at leiðari skúlans skrivliga hevur fráboðað hoyringina fyri kæraranum.
*Stk. 3.* Leiðari skúlans sendir kæruna, hoyringarsvarið og møguligar viðmerkingar frá kæraranum til landsstýrismannin.
*Stk. 4.* Freistin at kæra avgerðir sambært stk. 1 er 2 vikur frá tí degi, avgerð skúlans skrivliga er fráboðað kæraranum.

*Gjald*

**§ 11.** Skúlin verður heimilaður at krevja gjald frá hvørjum einstøkum luttakara fyri útreiðslur í sambandi við trygdarskeiðið, undir hesum luttøkugjald og gjald fyri prógv.

*Stk. 2.* Fyri lógarkravt trygdarskeið fyri manning á skipum, kann gjaldi fyri næmingar í fólkaskúla og tey, sum eru undir 21 ár og undir útbúgving fulla tíð í mesta lagi vera hálvt skeiðsgjald.

*Royndarskipan*

**§ 12.** Sambært § 7, stk. 1 í løgtingslógini kann landsstýrismaðurin eftir frammanundan lagdari ætlan skipa fyri royndarvirksemi og kann tá víkja frá reglum í hesi kunngerð, ásettar við heimild í § 6 í løgtingslógini.

*Gildiskoma*

**§ 13.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 73 frá 28. juni 2016 um trygdarskeið fyri manning á fiskiskipum og kunngerð nr. 100 frá 12. oktober 2012 um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 15. mai 2024

**Djóni Nolsøe Joensen**
*landsstýrismaður*

/ Poul Geert Hansen